# Avloysara fyri pedagog í barnsburðarfarloyvi

Á Barnagarðurin á Mýrunum ganga 94 børn. Á stovninum eru 2 vøggustovur við 14 børnum í hvørjari, 3 barnagarðsstovur við 18 børnum í hvørjari og ein barnagarðsstova við 12 børnum.

Umstøðurnar á stovninum eru sera góðar við ljósum rúmligum stovum við eyka spælirúmi. Harumframt er verkstaður, sansirúm, samtalu/venjingarrúm og stórt felagsrúm við barnavinarligum køki. Stovnurin liggur í vøkrum náttúrulendi beint við Toftavatn og nær við ítróttarøkið

Endamál stovnsins er, við støði í tí einstaka barninum at geva tí møguleika at mennast, bæði persónliga og saman við øðrum. Fyri at røkka málinum er neyðugt við einum tryggum og stimbrandi umhvørvi, við góðum samstarvi millum leiðslu, starvsfólk og foreldur.

**Vit ynskja tí at umsøkjarin:**

- hevur umsorgan fyri børnum
- hevur góð samstarvsevni
- er íðin, nærlagdur og álítandi
- hevur gott yvirlit og megnar at skipa dagin
- er nýhugsandi og ígongdsetandi

Søkt verður eftir avloysara fyri pedagog í barnsburðarfarloyvi, 35 t. um vikuna, til eina stovu við 18 barnagarðsbørnum frá 8.mai til 31.desembur 2006.

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Nærri fæst at vita um starvið við at tosa við Conny Jacobsen, varðaleiðara á tlf. 448254 ella 218254

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skal vera kommununi í hendi í seinasta lagi mikudagin 26. apríl 2006 kl. 12,00.

**Runavíkar Kommuna**
Sosiala deild
Heiðavegur 26
FO-600 Saltangará

# FLOGSKIPARI!




**Fundur um útbúgvingina**
**“trafikflyver - uddannelsen”**
**leygardagin 15. apríl 2006 kl. 14.00**

Tilmelding:
mail@karlog-air.dk ella (+45) 74 42 22 85

Karlog Air

# Tilboð ynskist

uppá at skifta takið á bygdarskúlanum í Miðvági.

Tilboðini skulu vera inni í seinasta lagi 24. apríl 2006 kl. 16.00.

Áhugað kunnu venda sær til umsjónarmannin á tlf. 219429.

**Miðvágs kommuna**

# Jarðarstykki í Nólsoy til sølu

Um hóskandi boð fæst, verður ognin matr. nr. 129 b, Nólsoy til sølu.

Ognin er eitt jarðarstykki, ið er 1178 m² til víddar og liggur úti á Eiðinum.

**Nærri fæst at vita á tlf. 327130 ella 281130**

# Til sølu

Vegna flyting er ein Mazda 323 1,3 -
Árgangur 1999 - Koyrt 66.000 km - Sera væl viðfarin
Ikki roykari - tveir eigarar



prísur 55.000 kr.
Tlf. 580912/373749

Vit gera alt
**URTAGARÐS-ARBEIÐI**
so sum:
Grasvøllir, planting og viðlíkahald. Vit gera eisini tún við flísum ella oljugrúsi. Vit seta gravsteinar upp. Vit átaka okkum eisini graviarbeiði sum t.d. at skifta oljutanga og tílíkt.

Spyr - tað kostar einki!

**Fa. Símun Dalsgaard**
Boðanesgøta,
FO-188 Hoyvík
Tlf. 315478 · far 282100
Fax 320478

**NORSKIR SKÓÐKATTAR TIL SØLU**



Vit eru 4 fittir norskir skóðkettu kettlingar, sum eru klárir at fara heimani í frá um 2 vikur.

Vit eru 3 kettir og ein frensur.

Tlf 581614 / 589988

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyristandandi viðv. hesum feløgum:**

**Nevnd og stjórn er farin frá.**
**Í dag eru fylgjandi feløg send Skiftirættinum til tvingsilsavtøku eftir § 87 jvb. § 86 í Sp/f-lógini og § 117 jvb § 118 í P/F-lógini.**

**Skrásetingarnr. Sp/f 2482,** Sp/f Jóhan Strømsten undir tvingsilsavtøku, 510 Gøta
**Skrásetingarnr. Sp/f 3058,** Sp/f Arkitektavirkið Heidi H.Poulsen ark. og Karl J. Danielsen, bygggifrøðingur undir tvingsilsavtøku, 110 Tórshavn
**Skrásetingarnr. Sp/f 1361,** Sp/f Tógv undir tvingsilsavtøku, 110 Tórshavn
**Skrásetingarnr. Sp/f 3081,** Sp/f Gjógv Holding undir tvingsilsavtøku, 476 Gjógv
**Skrásetingarnr. Sp/f 2591,** Sp/f Circle undir tvingsilsavtøku, 850 Hvalba
**Skrásetingarnr Sp/f 3789,** Sp/f JUJECO undir tvingsilsavtøku, 100 Tórshavn
**Skrásetingarnr. Sp/f 3805,** Sp/f Basalt undir tvingsilsavtøku, 100 Tórshavn

*Skráseting Føroya tann 31. mars 2006*

*Kristin Balle*

**NORÐURLANDAHÚSIÐ**

# Norðurlandahúsið um páskirnar

Skírisdag stongt.
Langa fríggjadag stongt.
Leygardagin stongt.
1. Páskadag stongt.
2. Páskadag stongt.
Týsdagin 18. apríl er húsið opið aftur sum vanligt.

# Tvøroyrar Klubbi

Lýsti aðalfundurin 2. páskadag er fyribils avlýstur.

**Nevndin**

Sosialurin